# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sólvit E. Nolsø, løgtingsmaður

**Svarari:** Ingilín Didriksen Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

**Evni:** Bíðilisti hjá Bústøðum

**Spurningar:**

1. Er ætlanin at broyta mannagongd, so tey, ið ikki eiga bústað frammanundan, sleppa framum á bíðilistanum hjá Bústøðum?
2. Hvussu nógv fólk standa á bíðilistanum hjá Bústøðum?
3. Hvussu nógv minkaði bíðilistin hjá Bústøðum í 2023?

**Viðmerkingar:**

Fleiri fólk í bestu árum hyggja til okkara grannalond heldur enn Føroyar at búseta seg. Tað er ein trupulleiki, sum vit eiga at taka í størsta álvara, tí tað kann geva stórar trupulleikar seinni, um stórir partar av árgangum velja at búseta seg aðrastaðni.

Ein avbjóðing, sum er partur av ítøkiliga trupulleikanum, er tørvurin á bústøðum.

Felagið Bústaðir er okkara bústaðarpolitiska amboð. Hundraðtals íbúðir eru komnar frá felagnum, og fleiri eru á veg, og Bústaðir hava tænt bústaðarmarknaðinum væl.

Men spurningurin er, um tíðin ikki er komin at hava eitt orðaskifti, um Bústaðir ikki skuldu málrættað, hvønn bygt verður til. Eitt nú gera Bústaðir ikki mun á fólki, sum standa á bíðilistanum. Stendur tú ovast á listanum, fær tú eina íbúð bodna. Tað er lættasti máti, men spurningurin er, um tað eisini er rættasti máti.

Tí verður landsstýriskvinnan spurd, um ætlanin er at broyta mannagongd, so tey, sum ikki eiga hús ella íbúð frammanundan, verða tikin framum tey, sum eiga bústað frammanundan.

**Á Løgtingi, 29. januar 2024**

Sólvit E. Nolsø